DTU

Fylgiskjal 2

Notat

Til Umhvørvismálaráðið

Vedr. Hoyringssvar til uppskot um veðurlagslóg

Fra Vilhjálmur Nielsen

Hoyringssvar til uppskot um veðurlagslóg

17-10-2025
Journal nr. xxx
VINI

Tað er gleðiligt at tað við uppskotinum verður lagt upp tl at Føroyar fáa eitt veðurlagsráð til at ráðgeva um veðurlagspolitikkin og serliga um virkisætlanirnar við ítøkiligum tiltøkum, ið skulu til fyri at røkka politisku málunum.

Eg havi tó nakrar viðmerkingar til uppskotið og serliga til viðmerkingarnar ið vísa, hvussu ætlanin er at ráðið skal virka.

Stødd og samanseting av Veðurlagsráðnum
Veðurlagsráðið hevur til endamáls at gera tilmæli og varskógva um at røkka málunum umframt at luttaka í almennum kjaki og varpa ljós á veðurlagsbroytingar. Hetta eru ymiskar uppgávur, sum krevja ymiskar førleikar og serkunnleikar, tí serkunnleiki um veðurlagsbroytingar er IKKI serkunnleiki um tiltøk fyri at minka um útlát.
Lagt verður upp til at Veðurlagsráðið skal hava tríggjar limir, men heimild er at hava fleiri limir, um grund er fyri tí. Hetta er ov lítið. Tí hetta loyvir ikki at fastur limur er við samfelagsvísundarligum ella samfelagsbúskaparligum serkunnleika. Tað hevur týðning, tí tá virkisætlanirnar skulu gerast, so eigur tað at vera gjørt á bíligasta og mest skynsama hátt fyri samfelagið. Hetta krevur annað og meira enn tekniskan ella náttúruvísindaligan serkunnleika. Um tað ikki verður tikið við beinanvegin, so verður tað ein eftirtanki ið kann føra til óneyðuga mótstøðu móti virkisætlanunum.

Undirmeting av fíggjarligum og búskaparligum avleiðingum
Í viðmerkingunum stendur, at fasti kostnaðurin av at reka veðurlagsráðið verður mett at vera 300.000 kr. sum verður útvegað við játtan, og at skrivstovuhaldið verður mett at kunna haldast innanfyri vanliga virkisjáttanina hjá Umhvørvisstovuni. Hetta er ein rættiliga lítil játtan, sum ikki rúmar fígging til at gera serligar kanningar og t.d. koyringar av simuleringum, sum kunnu vísa hvussu ein virkisætlan best kann setast saman, um ikki meðinparturin av hesum arbeiðinum er gjørt frammanundan. Tað merkir at har er ein fjaldur kostnaður til gransking og greining hjá antin Umhvørvisstovuni, Fróðskaparsetrinum og helst eisini øðrum, ið liggur uttanfyri

CVR-nr. DK 30 06 09 46

DTU Construct
Institut for Byggeri og Mekanisk teknologi
Anker Engelunds Vej 101
Bygning 101
2800 Kongens Lyngby
Tel. 45 25 25 25
Dir. 27 64 76 69
vini@dtu.dk
www.dtu.dk

hesa metingina. Ein partur av hesum kann metast longu at vera gjørt av Umhvørvisstovuni sum greiningar av útláti av veðurlagsgassi, men hetta er netupp bert partur av arbeiðinum.

Harumframt liggur ein kostnaður at fremja virkisætlanirnar, tá tær eru viðtiknar. Hetta er sjálvsagt mest kostnaður hjá vinnu, privatum og kommunum, men eisini her skal fylgjast við menningini og t.d. bæði binding av CO_2 í náttúruni ella undirgrundini og orkuskiftið á havinum krevur gransking og samfelagskjak út frá hesum, tí ein umlegging av fiskiflotanum kann vera partur av svarinum, tá uppgávan er at fáa sum mest av virði til høldar við lægst møguligum útláti.

Bygging og bygningar

Byggivinnan og upphiting av bygningum er eitt annað øki har gransking skal til og vegleiðingar gerast fyri at minka bygningsskaðum sum fylgi av betri bjálving, um tað ikki verður gjørt rætt. Týðningurin av orkusparing í bygningum sæst m.a. aftur í tørvinum á streymi til varmapumpur um summarið. Tá lítið av vind- og vatnmegi er – serliga um summarið - so er tað Sundsverkið sum veitir streymin við olju – og tí við CO_2-útláti. Hetta víkir frá myndini sum t.d. sæst í Danmark, hagani núverandi byggikunngerð er umsett frá. Tørvur er tí á gransking og menning innan hetta øki, sum er serliga átroðkandi at gera nakað við beinanvegin, tí tey hús ið verða bygd ella umbygd nú standa eisini um 50 ár. Tvs. at tað loysir seg at byggja rætt beinanvegin í staðin fyri at koma afturumaftur. Gransking og menning fyri at gera eina nýggja byggikunngerð eftir føroyskum viðurskiftum eigur tí at raðfestast av Umhvørvismálaráðnum, sum varar av økinum. Tað er ov seint at fara í holt við hetta arbeiði tá ein virkisætlan skal gerast, og samstundis er hetta gott dømi um at tað longu nú er neyðugt, so tí er tað IKKI rætt at uppskotið ikki hevur fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar. At fáa góðar leiðbeiningar grundaðar á gransking vil tó væntandi føra til lægri samlaðan kostnað fyri byggiharrar ið kunnu fáa betri bygningar og við lægri upphitingarkostnaði.

Vilhjálmur Nielsen
Granskari